## Margretha umhugsar trúnuna

Margretha drotning umhugsar av álvara at siga trúnuna frá sær. Tað stendur í einari nýggjari bók, sum er á veg. Sambært blaðnum B.T. vil Heindrikur prinsur sleppa at flyta til Fraklands, haðani hann er ættaður, og drotningin er til reiðar at siga trúnuna frá sær, so tey kunnu flyta til Fraklands. Margretha drotning fyllir 70 tann 16. apríl næsta ár, og sambært bókini umhugsar hon at fara frá tá. John Lindskog, sum hevur skrivað ta nýggju bókina, sigur við B.T., at hann endurgevur keldur, sum standa kongshúsinum nær.



## Tíma ikki á val

Um ein lítlan mánað verður kommunuval í Danmark, men tað verða eftir øllum at døma ikki teir ungu veljararnir, sum fara at standa fremstir í røðini í valhølunum. Ein nýggj kanning vísir, at bara 31 prosent av teimum 18 til 29 ára gomlu vita, hvussu borgarstjóravalevnini í teirra kommunu eita, og bara 20 prosent siga, at tey hava stóran áhuga fyri kommunuvalinum. Valgranskarin Johannes Andersen er ikki ovfarin av úrslitinum. Hann sigur við DR, at tað er ikki fyrr enn um 40 ára aldur, at fólk veruliga fáa áhuga fyri kommunupolitikki.

# Mótmæla bankaavgjaldi

**Felagið fyri føroyskar peningastovnar mótmælir ætlanini hjá landsstýrinum um at hækka lønhæddaravgjaldið fyri banka- og tryggingarvirksemi**

AVGJALD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lønhæddaravgjald er eitt gjald, sum álagt ávísum vinnugreinum, ið eru frítiknar fyri mvg. Avgjaldið fyri banka- og tryggingarvirksemi er í løtuni 5 prosent, men hetta skal ætlandi hækkast til 10%. Hinvegin er ætlanin ikki at hækka avgjaldið fyri heilsurøktartænastur so sum tannlæknavirksemi, fysioterapi og læknavirksemi.

- Tá Føroya Banki varð einskildur gjørdi Landsstýrið nógv burturúr at vissa altjóða íleggjarum, at Føroyar høvdu stabilar íløgukarmar. Undir hesum fortreytum seldi Landskassin túsundtals íleggjarum í Føroyum og uttanlands partabrøv í almennum fyritøkum. Hesir íleggjarar hava keypt partabrøv í tiltrúgv til, at karmarnir fyri børsskrásettu fyritøkurnar, herundir tær sum Landskassin sjálvur hevur selt, ikki tilvildarliga verða gjørdar verri enn fyri aðrar fyritøkur í Føroyum. Tí vil tað verða vandamikið so skjótt aftaná at broyta grundleggjandi karmar, serliga tá hetta er rættað móti nøkrum fáum fyritøkum, herundir tveimum teimum størstu børsskrásettu fyritøkunum, skrivar felagið fyri peningastovnar millum annað í tíðindaskrivinum.

Eisini heldur felagið, at talan er um beinleiðis andsøgn, tá landsstýrið sigur seg vilja marknaðarføra Føroyar sum íløguland og samstundis leggja serskatt á helvtina av teimum børsskrásettu feløgnum í Føroyum.



*Lógin um lønhæddaravgjald fevnir – umframt banka- og tryggingarvirksemi – eisini um tannlæknavirksemi, læknavirksemi, fysioterapeuti og kiropraktik. Í hesum umfarinum er ætlanin tó einvíst at hækka avgjaldið fyri banka- og tryggingarvirksemi*

# Yvirskot á handilsjavnanum

**Føroyski innflutningurin er higar til í ár minkaður við einari milliard. Útflutningurin er eisini minkaður, men langt ífrá í sama mun, og tí er yvirskot á handilsjavnanum fyri fyrstu ferð í sjey ár**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hagstovan skrivar á heimasíðu sínari, at føroyski innflutningurin fyrstu níggju mánaðirnar í ár hevur verið 2.451 tkr. Hetta er ein milliard minni enn í fjør, og í prosentum svarar minkingin til 23%.

Útflutningurin hesar mánaðirnar er minkaður við sjey prosentum, og tí er nú líkt til, at handilsjavnin í ár vísir eitt yvirskot. Og tað er ikki hent síðani í 2002.

**Innflutningur jan.-aug. í mió. kr. og prosent**

| | 2008 | 2009 | Munur | % munur |
|---|---|---|---|---|
| Til hav- og landbúnað | 81 | 93 | 12 | 15 |
| Rávøra til fiskavirking | 45 | 64 | 19 | 43 |
| Tilfar til byggivinnu | 393 | 232 | -162 | -41 |
| Tilfar til annan ídnað | 671 | 527 | -144 | -21 |
| Maskinur og amboð | 363 | 234 | -129 | -36 |
| Brennievni | 796 | 441 | -355 | -45 |
| Akfør | 205 | 59 | -145 | -71 |
| Til beinleiðis húsarhaldsnýtslu | 897 | 801 | -96 | -11 |
| Skip og flogfør | 88 | 273 | 185 | 210 |
| **Samantalt** | **3.540** | **2.724** | **-816** | **-23** |
| **Samantalt uttan skip og flogfør** | **3.452** | **2.451** | **-1.000** | **-29** |

*Talvan sýnir føroyska innflutningin í 2009 samanborið við 2008 býtt á høvuðsbólkar*